**TÍ TATOVERA VIT OKKUM.** JÓHANNA, JÁKUP PAULI OG MAIBRITT.
TRÝ SERA YMISK FÓLK, SUM HAVA EITT TIL FELAGS – TEY ELSKA TATOVERINGAR.
JÓHANNA ,TÍ AT TAÐ MINNUR HANA UM SÍNI KÆRU, JÁKUP PAULI OG MAIBRITT,
TÍ TAÐ ER EIN PARTUR AV TEIRRA STÍLI AT LITA KROPPIN.

# TATOVERINGIN HJÁLPTI MÆR VIÐ SORGINI

**JÓHANNA Í KRÓKI** HEVUR HAFT EITT TUNGT ÁR. Í JANUAR DOYÐI MAMMA HENNARA 58 ÁR, OG MÁNAÐIN EFTIR DOYÐI SYSTURDÓTTURIN EITT ÁRA GOMUL. FYRI AT HEIÐRA TÆR BÁÐAR FEKK JÓHANNA SÆR EINA **TATOVERING** Á RYGGIN.



MYND: JENS KRISTIAN VANG



**KROPPSPRÝÐI**

Inna Tørnroos
inna@sosialurin.fo

Jóhanna hevur fýra systrar. Tá ein teirra giftist 3. januar segði pápi teirra, at nú átti hann tríggjar Katrin – konuna og tvær abbadøtur. Ein mánað seinni var bara ein teirra eftir.

– Vit hava verið spard fyri alt slíkt í langa tíð, og so hendi hetta, sigur Jóhanna í Króki.

Sorgin var sjálvandi stór, og Jóhanna vildi gera okkurt at minnast mammu sína og systurdóttrina við.

– Eg gjørdi tatoveringina tá eg, systrarnar Sólfríð, Rigmor og pápi vóru í Manchester í summar. Rigmor var mamma til lítlu Katrin, sum doyði, greiður Jóhanna frá.

Tatoveringin er av eini lilju – sum ímyndar mammuna Katrin. Ein lítil ljósareyð stjørna inni í liljuni er ímynd av lítlu didduni. Fimm stórar og fimm lítlar stjørnur eru rundanum liljuna. Tær ímynda børnini hjá systrunum, og pápan og tær fýra systrarnar!

– Tatoveringin merkir sera nógv fyri meg. Hon er ein ímynd av øllum, sum er týdningarmikið í mínum lívi, sigur Jóhanna.

Pápin Petur var við Jóhannu, meðan tatoveringin varð gjørd.

– Hann var sera rørdur.

Hóast at sorgin eftir mammuna og systirdóttrina hevur verið tung, so heldur Jóhanna, at sorgin hevur gjørt hana sterkari.

– Eg síggi meiri virði í lívinum. Nú veit eg, hvussu skjótt tað kann verða liðugt, sigur hon.

## FAKTA **JÓHANNA Í KRÓKI**

**Aldur:** 25 ár
**Bústaður:** Strendur
**Tatoveringar:** Tvær
**Fyrsta tatoveringin tá eg var:** 18 ár